Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðul til unga kvinnu á Skálafjørðinum

Stuðulstænastan søkir eftir stuðlum til unga kvinnu at byrja skjótast gjørligt. Gentan er 18 ára gomul, fjølbrekað, og flytir í egna íbúð í næstum. Hon gongur í skúla og tørvar hjálp í dagligdegnum.

Starvið fevnur um at stuðla og vera um gentuna eftir loknan skúladag, at fara við henni til ymisk tiltøk, og á tann hátt vera við til at geva henni ein innihaldsríkan gerandisdag.

Starvið er mett til at verða antin fulla ella niðursetta tíð.

**Setanartreytir:**
Talan er um starv innan Nærverkið, og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá Anniku Hansen ella Fíu Jespersen á tlf. 354020.

**Umsókn:**
Send eina umsókn til Annikah@naerverk.fo, sofiej@naerverk.fo ella:

Stuðulstænastan
Løkjatún 1,
F0–160 Argir

**Umsóknarfreist: 31. august 2007**

Trivnaðartænastan

## Endurlýsing eftir Pedagogi til Umlættingina á Garðavegi 38, Klaksvík

Søkt verður eftir pedagogi at byrja 1. september 2007 og fyribils til 31.12.07. Tey, sum gera brúk av umlættingini, hava eina fasta skipan. Til umlættingina koma ung/børn við autismu. Tí er ynskiligt at viðkomandi hevur vitan innan hetta økið. Arbeiðið fevnir millum annað um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum ungu/børnum og verandi starvsfólkum. Dentur verður lagdur á, at tann, ið sett/ur verður, er likamliga væl fyri og er áhugað/ur í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi dag, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils í Umlættingini á Garðavegi.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 456320 ella 258679

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Umlættingin á Garðavegi 38,
700 Klaksvík
Stílað: Asta Poulsen, leiðara

**Umsóknarfreist: 31.08. 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Heimatænastan

## Starvsfólk til dagtilhaldið Stjørnulon í Tórshavn

Stjørnulon er eitt dagtilhald fyri 8 fólk, ið eru minnisveik og sum búgva heima. Dentur verður lagdur á at stuðla húsfólkunum soleiðis, at tey fáa ein innihaldsríkan gerandisdag. Tilboðini fevna m.a. um sang, lesnað, matgerð, ítrivsarbeiði og at ganga túrar.

**Arbeiðsøki:**
- Saman við hinum starvsfólkunum at skapa eitt heimligt umhvørvi, har húsfólkini trívast.
- Kontaktpersónur hjá nøkrum húsfólkum og avvarðandi.
- Luttaka í matgerð, ítrivsarbeiði og øðrum virksemi.

**Førleikakrøv:**
- Heilsufakligútbúgving við kunnleika til minnisveik er ein fyrimunur.
- Evni til at vera um menniskja í síni heild, har pláss er fyri ymsum áskoðanum.
- Evni at samstarva við húsfólk, avvarðandi og samstarvsfelagar.

**Vit bjóða:**
- Heimligt og positivt arbeiðsumhvørvi við fakligum og menniskjaligum avbjóðingum.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ester Husgaard, leiðara á Stjørnulon, tlf. 218109.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Talan er um starv innan Nærverkið og tænastustaðurin er fyribils í Stjørnulon. Starvsbrøkurin er 0,8.

**Umsókn:**
Umsókn við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:
Nærverkið
Eirargarður 2
Postboks 3037
110 Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus

**Umsóknarfreist: 31. august 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!




**NEX PC-1 hjálmur.** Flottur heildekkandi hjálmur við allergivinarligari bjálving og løttum lási til høkureim. Hevur klárt glas, ið ikki skøvast. Er góðkendur til motorsúkklu og er tí eisini væl egnaður til knallert og skutara. Fæst í fleiri litum.Fæst í hesum støddum: M, L, XL, XXL.

EINANS 790,-

www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · telefon 227 000

Sosialurin Sosialurin i